# n stórur fyrimunur hjá vaskifólki

partur av vegleiðingini um trygdina, sigur hann.

**Umhvørvið**

Ein annar partur er umhvørvi, og her leggur Kemilux dent á, at gingið verður væl um.

– Umhvørvið er bæði tað, sum er úti – uttan um okkum, men eisini tað, sum er inni, har vaskað verður.

Jón vísir á, at umhvørvið viðkemur okkum øllum, bæði framleiðarum og brúkarum, og tí ynskir Kemilux eisini, at umhvørvisligi parturin er við í vaskikunningini.

– Eitt er, at tað er reint og nossligt, har vaskað er. Annað er, at tú ikki dálkar umhyørvið meira enn neyðugt. Í triðja lagi – men ikki minst – snýr tað seg eisini um trygdina hjá vaskifólkinum sjálvum; at ansa eftir eygum, hondum og tí, sum kann koma at sápuni.

Hann sigur, at tað er ógvuliga týdningarmikið at kenna etikettina og sápuna og hendir tað ringasta, at fólk fáa sápu í eyguni, kann tað vera ein stórur fyrimunur, at læknin kann ringja til framleiðaran og spyrja, hvørji evnini í sápuni eru. Hann sigur, at tað altíð er umráðandi at fylgja vegleiðingini á etikettini.



*– Eitt er, at tað er reint og nossligt, har vaskað er. Annað er, at tú ikki dálkar umhvørvið meira enn neyðugt. Í triðja lagi – men ikki minst – snýr tað seg eisini um trygdina hjá vaskifólkinum sjálvum, sigur Jón Miðberg*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Besta úrslitið**

– Ov nógv sápa gevur verri úrslit, fer verri við yvirflatuni, og kann verða til bága fyri fólk og umhvørvi.

Hinvegin, sigur Jón, at røtt "dosering" gevur besta úrslitið, eins og vaskingin verður bíligari, tí minni sápa gongur.

– Fólk, sum vaska við sápu, eiga altíð at vera í handskum, leggur hann aftrat.

Jón Miðberg sigur, at eitt gott hugskot, tá ið vaskað verður í køki, har matur verður tilgjørdur, er at skifta sápu av og á, eitt nú frá basiskari sápu til súrsápu. Somuleiðis er skilagott at sóttreinsa viðhvørt.

– Hetta kann verða við til at gera, at bakteriurnar ikki gerast resistentar ella mótstøðuførar, sigur hann at enda.





*Nógv vaskifólk hava gjøgnum tíðirnar fingið likamligar skaðar av vaskiarbeiði. Í "gomlum" døgum høvdu tey bara skrubbu og tvøðu, men nú eru umstøðurnar – eisini í so máta – nógv betur, tí amboðini eru fleiri og betri*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*